# Vitjaðu 14 lond í 14 mánaðir

**Hjúnini Sólfríð og Hans Michael í Mittúni hava verið á eini drúgvari ferð kring heimin og hava upplivað mangt og hvat. Leygarkvøldið fara tey at greiða frá ferðini á einum tiltaki í Klaksvík**

FERÐING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tey hava súkklað á Golden Gate brúnni í San Francisco, tey hava heinta appilisinir í Australia, vitjað inka-indianarar í Peru og arbeitt á barnaheimi í Tansania.

Tað eru nakað av tí, sum hjúnini Sólfríð og Hans Michael í Mittúni hava upplivað á drúgvari ferð kring knøttin.

- Tá ið vit vóru lesa, so tosaðu vit um, hvat nú skuldi henda. Spurningurin var, um vit skuldu flyta aftur til Klaksvíkar og etablera okkum, ella um vit fyrst skuldu royna okkurt heilt annað. Vit høvdu tosað um at fara at eina drúgva ferð. Vit tosaðu nærri um tað, og vit gjørdu av, at tað vildu vit royna fyrst, greiðir Hans Michael frá.

Tey býttu ferðina hjá sær upp í tvey. Fyrri parturin var at ferðast til ymisk lond og uppliva so nógv sum gjørligt. Seinni parturin skuldi brúkast til okkurt meira vælgerandi arbeiði, og tað var at arbeiða á einum barnaheimi í Tansania.

- Tað var stuttligt at ferðast, vit upplivdu nakað nýtt hvønn dag, og vit sóu nógv kend støð. Hálva árið á barnaheiminum í Afrika var ein heilt onnur uppliving. Vit sóu ikki kend støð, men upplivdu ein heilt annan gerandisdag enn í Føroyum, sigur Sólfríð.

## Hjálpa barnaheimi

Leygarkvøldið fara Sólfríð og Hans Michael at hava eitt tiltak í Ósáskúlanum í Klaksvík.

Har fara tey at bjóða fólki innar at síggja nakað av tí, sum tey upplivdu á drúgvu ferðini. Tey ætla at vísa myndir, greiða frá og eisini sýna okkurt av tí fram, sum tey høvdu við sær á ferðini og heimaftur við.

Tíðin á barnaheiminum í Tansania er heldur ikki farin aftur við borðinum uttan nakað.

- Á barnaheiminum búðu bara dreingir, men vit eru nú farin í holt við at savna pengar inn, so at barnaheimið eisini kann fáa eina deild til gentur. Tað er tað brúk fyri, sigur Sólfríð.

Hesum nýggja projekti fara tey eisini at greiða frá á tiltakinum, sum verður leygarkvøldið kl. 19.00.



*Sólfríð og Hans Michael í Mittúni løgdu millum annað leiðina fram við hjá inka-indianarunum í Peru*




## Kranførari til Skipasmiðjuna

Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi umhvørvi, við stórum fjølbroytni, í eini tí stórstu fyritøkuni í Føroyum?

Vit leita eftir einum kranførara við prógvi B (mobilkrana). Arbeiðið fevnir um koyring við mobilkranum okkara, bæði á deildum okkara í Tórshavn, á Skála, í Runavík og í Vestmanna, eins og runt landi. Arbeiði fevnir eisini um planlegging av arbeiði og viðlíkahald av kranunum.

Vit roknað við at tú ert røkin, álítandi, ikki bangin fyri at taka ímóti avbjóðingum og hevur lætt við at tosa við fólk.

Ring ella ein teldupost til info@faroeyard.fo, og vit taka eitt prát saman.

Tú kannst eisini senda eina umsøkn til:

Tórshavnar Skipasmiðju P/F
Postboks 65
FO-110 Tórshavn

Att: Svein Patursson

Starvið verður at seta sum skjótast

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Svein Patursson á telefon 79 11 52 ella Jens Hansen á telefon 79 11 34

- ein depil innan skipatænastur

SKIPASMIÐJAN

## HANDILSLÆRLINGUR

**Vit sóknast eftir einum lærlingi til okkara HVS-handil.**

**Tín førleiki**
Vit vóna at tú ert fyrikomandi, íðin, nærlagdur, sjálvstøðugur og skilur týdningin av góðari kundarøkt. FHS ella onnur miðnámsútbúgving er ein fyrimunur.

**Afturfyri bjóða vit**
Eitt starv har ið tú saman við øðrum kemur at taka tær einum spennandi og fjøltáttaðum handli. Tú fært møguleika at hjálpa og leiðbeina kundum okkara, samstundis sum tú fært ábyrgd og møguleika til at menna okkara handil – Stutt sagt eitt spennandi starv í einari fyritøku í støðugari menning.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum er, **týsdagin 8. apríl.**

Um tú hevur spurningar, ert tú vælkomin at ringja til okkara á tel. 312 000

**MARIA POULSEN PF**
Postmoga 182
FO-110 Tórshavn



Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo

www.sosialurin.fo

# Haldaragjald!!!



**Hava tit minst til at gjalda haldaragjaldið fyri apríl ársfjórðingin?**

**Steðgidagur er 31. mars.**

Sosialurin